# l íverksetari



Tann fyrsta dagin var lítið og einki fólk, tí veðrið var so ólagaligt. Hetta gav eitt dundrandi undirskot, so tú skilir at her stóð eitt sindur á mær

(Evald Johannesen, íverksetari)

Rani segði beinleiðis við meg: "Altso, Evald. Hvat bíðar tú eftir? Hetta er simpelthen perfekt! Far í gongd beinanvegin!

(Evald Johannesen, íverksetari)

Vit báðir vóru í somu støðu, tí vit bara ynsktu at sleppa í gongd

(Evald Johannesen, íverksetari)

*- Paintball er væl umtókt í Føroyum, slær Evald fast, her hann er farin í paintball-búnan. Øll familjan hjálpir honum í ætlan síni, m.a. vaskar omman búnarnar fyri hann*

*Mynd: Høgni Thomsen*



– Eg var til ein fyrilestur, har tann sum helt fyrilesturin segði, at tú var tann einasta forðingin fyri at fara í gongd.

- Hetta gav mær eitt spark í eitt ávíst stað. Tá fór eg av álvara undir verkætlanina hjá mær, sigur Evald.

Hann gjørdi eina lýsing av ætlanini – eina virkisætlan sum tað eitur – og fekk góða ráðgeving frá Rana Nolsøe í Íverksetarahúsinum. Hesin dámdi ætlanina beinanvegin.

- Ja, Rani segði beinleiðis við meg: "Altso, Evald. Hvat bíðar tú eftir? Hetta er simpelthen perfekt! Far í gongd beinanvegin!", greiðir Evald frá.

Eftir hesi lovandi orðini legði hann síðani virkisætlanina fyri fíggingarstovnin og fekk ikki óvæntað játtan til at fara í gongd.

– Pápi mín heitti kortini á meg um at bíða eitt sindur, men nú var tíðin so búgvin.

– Í dag kann eg bara staðfesta at ætlanin hevur verið sera væl móttikin.